


*Leikararnir, sum eru í Skotlandi, men spæla uttanfyri Føroyar: Gunnar Nielsen, Tranmere Rovers 24 ár*

# Helst yngsta landsliðið nakrantíð

**FÓTBÓLTUR** Føroyska liðið, sum í annaðkvøld tekur dystin upp við skotar í annaðkvøld, er ivaleyst tað yngsta, ið nakrantíð hevur umboðað Føroyar á hægsta altjóða støði. Níggju mans eru 22 ella yngri

Rólant Waag Dam

Tað er ein sera ungur hópur, Brian Kerr hevur valt sær til venjingardystin í móti Skotlandi í annaðkvøld. Jónhard Frederiksberg er 30 ár, men annars er ikki ein tann einasti leikari eldri enn 30 og bara seks mans í hópinum eru omanfyri 25 ár.

Yngsti leikarin er 19 ára gamli Jóan Símun Edmundsson og næstyngstur er 20 ára gamli Erling Jacobsen. Síðani eru fýra 21 ára gamlir mans og tríggir 22 ára gamlir. Altso tilsamans níggju leikarar undir 22 ár.

Miðalaldurin á hópinum er 23,7 og tað er ógvuliga ungt. Samanbera vit við tann hópin, sum fekk javnt móti Norður Írlandi seinast føroyska landsliðið spældi, so er liðið yngt fleiri ár. Eingin av teimum seks, sum eru skiftir út í mun til nýggjasta hópin, var undir 24. Hinvegin vóru bæði 40 ára gamli Jákup Mikkelsen, 36 ára gamli Egil á Bø og 32 ára gamli Fróði Benjaminsen við, og tað hækkar miðalaldurin rættiliga fitt. Miðaldurin á liðnum tá var 26,4, og sostatt er landsliðið yngt knapliga trý ár.

Hóast fleiri av ungu føroysku monnunum longu nú hava nógvar dystir í skjáttuni, so slepst ikki undan um, at landsliðið er munandi óroyndari hesaferð enn seinast. Tá Jákup Mikkelsen og Fróði Benjaminsen ikki eru við, minka landsdystarroyndirnar við fleiri enn 120 landsdystum.

*rolant@sosialurin.fo*

## Unga landsliðið:

**19 ár Jóan Símun Edmundsson**
**20 ár Erling Jacobsen**
**21 ár Christian R. Mouritsen**
**21 ár Rógvi Baldvinsson Ålgård**
**21 ár Rógvi Poulsen**
**21 ár Pól Jóhannus Justinussen**
**22 ár Levi Hanssen**
**22 ár Jóhan Troest Davidsen**
**22 ár Bogi Løkin**
**23 ár Jónas Þór Næs**
**24 ár Tórður Thomsen**
**24 ár Gunnar Nielsen**
**26 ár Jann Ingi Petersen**
**27 ár Hjalgrím Elttør**
**27 ár Daniel Udsen**
**28 ár Atli Gregersen**
**28 ár Christian L. Holst**
**30 ár Jonhard Frederiksberg**

# Skulu gagnnýta møguleikan

**FÓTBÓLTUR** Venjingardystirnir hjá landsliðnum eru ógvuliga fáir í tali og tí fegnast Brian Kerr um møguleikan, hann og lið hansara fær í móti Skotlandi. – Og eftir góða úrslitið móti Norður Írlandi, er tað stórur áhugi fyri dystinum. Tann møguleikan skulu leikararnir gagnnýta, sigur landsliðsvenjarin

Rólant Waag Dam

Í gjár vóru 7000 atgongumerki seld til venjingardystin, Skotland spælir móti føroyska landsliðnum í morgin. Millum áskoðararnar teljast umboð fyri fleiri feløg, sum halda eitt vakið eyga við føroysku leikarunum.

– Tann møguleikan skulu okkara leikarar gagnnýta. Og hvat hevði tað ikki verið fantastiskt, um tveir ella tríggir leikarar fáa ein sáttmála burtur úr hesum. Eg veit frá mínum keldum, at tað er stórur áhugi fyri dystinum og at fleiri umboð koma at hyggja, nú leikararnir stóðu seg so væl í móti Norður Írlandi, greiðir Brian Kerr frá.

### Sera stóran týdning

Onkur vildi kanska hildið, at tað var óneyðugt við einum slíkum dysti nú kappingarárið var av, leikararnir treingja til ein steðg og at einki stig stendur upp á spæl. Brian Kerr valla verið meiri ósamdur við hesum sjónarmiðnum.

– Allir altjóða dystir eru av týdningi. Ikki minst hjá okkum, sum hava so fáar venjingardystir. Hjá leikarunum er eisini nógv at spæla fyri persónliga. Harumframt kunnu ungu og óroyndu leikararnir fáa sær eitt sindur av altjóða landsdystarroyndum, sigur Brian Kerr.

Hann vísir á, at steðgurin í Vodafonedeildini er ov langur eftir hansara tykki, tá tað ganga fleiri mánaðir frá at landskappingin er til ein nýggj byrjar. Tí setir hann stóran prís upp á teir møguleikar, hann fær at síggja leikararnar í dysti og undir venjing.

### Eru væl fyri

Brian Kerr var á vøllinum saman við leikarunum sunnudagin. Og hóast føroyska kappingin er av fyri tíð síðani, so er formurin ikki farin enn.

– Leikararnir eru væl fyri. Teir stóðu seg væl undir venjing og vísa sum heild tann rætta hugburðin. Eg havi tikið fleiri, sum hava staðið seg væl á U21-landsliðnum og í landskappingini við.Og tað er heldur eingin ivi um, at ungu menninir eru nóg góðir til altjóða støði. Teir vanta bara eitt sindur av royndum, men tað fáa teir nú, sigur Brian Kerr.

### Væntar eitt gott avrik

Spurningurin er so, hvat Brian Kerr væntar sær av ungu monnunum og restini av hópinum?

– Eg vænti mær, at leikararnir geva eitt gott avrik. Besti dysturin á útivølli, vit hava spælt, var í móti Estlandi. Fáa vit eitt avrik, sum minnir um tað, so er tað gott, sigur Brian Kerr, landsliðsvenjari.

